

# Leys størv

**Dagreingerðarfólk til umsitingina**

Søkt verður eftir fyrikomandi og fleksiblum fólki til dagreingerð og annað fyrifallandi arbeiði í fyrisitingarbygningunum í miðbýnum. Arbeiðstíðin verður millum 6-8 tímar um dagin.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir skulu verða Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. oktober 2006.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Bjørgfríð Ludvíg ella Gudni Olsen, tlf. 302010.

**Skrivstovufólk til Dagrøktarskipanina**

Søkt verður eftir einum skrivstovufólki til Dagrøktina at arbeiða 20 tímar um vikuna fyrrapartar at byrja skjótast til ber.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir skulu verða Dagrøktarskipanini, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi leygardagin 28 oktober 2006.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Trónd Ennistíg, dagrøktarleiðara, á tlf. 302010.

**Pedagogur til Margarinfabrikkina – virkishúsið fyri børn og ung**

Søkt verður eftir einum hjálparfólki at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. november 2006 ella skjótast til ber.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir skulu verða Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 27. oktober 2006. Viðmerk á umsóknina „Pedagogur til Margarinfabrikkina".

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Boga Andreasen, leiðara, tlf. 213217.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

---

**Toll- og Skattstova Føroya**

# Løgfrøðingar

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina o.a. og skuldarinnkrevjing av eftirstøðum.

Stovnurin hevur 135 starvsfólk.

Økisskrivstovurnar røkja raksturin.

Stýrið tekur sær av yvirskipaðari planlegging og stýring. Stýrið virkar sum ráðgevi hjá økisskrivstovunum í løgfrøðiligum og øðrum fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, onnur avgjøld og innheinting. Stýrið hevur landsstýrismannatænastu, og er skrivarastova fyri Toll- og Skattaráðið. Stýrið hevur samskifti við aðalráðini og landsstýrið

Í Stýrinum starvast 25 fólk.

Toll- og skattstova Føroya, Stýrið, ynskir at seta 2 løgfrøðingar.

**Uppgávurnar hjá løgfrøðingunum eru m.a.:**
· at ráðgeva Toll- og skattstovuni kring landið í løgfrøðiligum spurningum innan skatta-, avgjalds- og innkrevjingarøkið,
· at leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta- og avgjaldsøkinum,
· at gera ummælir í kærumálum, dómsmálum, og
· at luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava cand. jur. útbúgving. Viðkomandi skal hava góð samstarvsevni, vera fyrikomandi og arbeiðssamur/-som. Fyrimunur kann vera, um umsøkjararnir hava viðkomandi arbeiðsroyndir, men hetta er als ikki ein treyt. Umsøkjarar, ið eru við at verða liðug við útbúgvingina, eru eisini vælkomin at søkja starvið.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis er fakliga krevjandi, har tú í stóran mun hevur møguleika fyri sjálv/-ur at leggja arbeiðið til rættis. Møguleiki er fyri eftirútbúgving.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búðskapar- og Løgfrøðingarfelagið.

**Setanarøki**
Núverandi setanarøkið er Stýrið, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Umsóknir**
Um tú ynskir at vita meira um starvið, er tú vælkomin at venda tær til Vivi Egholm ella Jákup Eyðfinn Kjærbo tlf. 352600. Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 6. november 2006 kl. 12.00.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: tollskatt@tollskatt.fo

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postrúm 2151
FO-165 Argir

---

# Samljóð í Skopun

**Frá 12. - 15. oktober verða evangelisk møtir við Viggo Wilhelmsen úr Noregi hósdagin kl. 20.00 í Betania**



## Í Samljóð:

**Fríggjakvøldið kl. 19.00**
**Bill Justinussen** syngur

**Leygarkvøldið kl. 19.00**
**Lisa Fredriksberg** syngur
(kaffi aftan á møti)

**Sunnudagin kl. 11.00**
**Morgunmøti**

**Sunnukvøldið kl. 19.00**
**Heini Lützen** syngur

***Øll eru vælkomin***

---




---

# Bilmekanikari

VR-Bilar søkir eftir bilmekanikara at byrja skjótast tilber.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv og royndir sum bilmekanikari. Umsøkjari skal eisini vera fyrikomandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Skriftlig umsókn skal sendast til

VR BILAR

VR-Bilar Sp/f
Hoyvíksvegur 61
Postsmoga 3130
FO-100 Tórshavn

Meir fast at vit við at venda sær til Jóhann Wolles á Telefon 222 374.

VR-Bilar er ein bilfyritøka í støðugari menning, sumselur persónbilar av merkinum Volvo, Renault, og Chevrolet, umframt Volvo Bussar og Lastbilar. Afturat bilasøluni eru 2 verkstøð. Eitt persónbila- og eitt lastbilaverkstað. Til at veita hesum tænastu er ein eykalutagoymsla. Á VR-Bilum starvast í løtuni 18 fólk, har av 12 á verkstøðunum.